# Stóríløgur í oljuvinnu á Atlantsmótinum

**Komandi árini verða gjørdar íløgur at menna oljuøkið millum Hetland og Føroyar fyri millum 10 og 20 milliardir krónur**

Atlantmótið og olja

*Jan Müller*

Bretski orkumálaráðharrin Hellen Liddell hevur givið grønt ljós fyri einum risastórum íløgupakka í oljuvinnuna um okkara leiðir. Talan er um ikki færri enn 13 milliardir krónur, sum komandi árini skulu brúkast í verkætlanum á Atlantsmótinum og eystan fyri Hetland og Skotland. Haraftrat koma aðrar milliardaíløgur, sum eitt nú BP fer at nýggjum oljufeltum og á oljuterminalinum í Hetlandi

Mest áhugaverda verkætlanin fyri okkum føroyingar man vera avgerðin at leggja eina gassrørleiðing á havsins botn frá Foinaven og Schiehallion oljufeltunum skamt frá føroyska markinum, víðari til Sullom Voe oljuterminalin í Hetlandi og higani til oljufeltið Magnus, sum liggur nakað norðan fyri Hetland. Hetta verður fyrsta stigið til at byggja upp ein infrastruktur á oljuleiðunum vestan fyri Hetland. Endamálið við hesi verkætlanini er at gera nýtslu av øllum avlopsgassinum frá Foinaven og Schiehallion oljukeldunum, ístaðin fyri at lata tað fara út í tóma luft ella koyra tað niðuraftur í goymslurnar. Harvið minkar tú um dálkingina. Men vinnuliga sæð fær tú nú brúkt gassið til at longja um livitíðina hjá Magnus oljufeltinum í Norðsjónum. Gassið frá teimum báðum feltunum á Atlantsmótinum verður sprænt niður í undirgrundina á Magnus feltinum til tess at trýsta størri nøgdir av olju upp. Henda mannagongdin skal longja livitíðina hjá Magnus við nógvum árum.

Fyri føroyingar hevur henda verkætlanin eisini stóran áhuga. Tí verður gass funnið á føroyskum øki nær við bretsku feltini, er ikki óhugsandi, at framtíðar samstarvið millum Føroyar og Bretland á oljuøkinum kann hava við sær, at føroysk gassfelt kunnu knýtast í rørleiðingar, sum tá longu liggja tætt við markið. Hetta kann t.d. fáa sera stóran týdning fyri eitt olju- og gassfelt, sum liggur bæði føroysku og bretsku megin markið.

Hinar íløgurnar, sum skulu gerast í skotsku oljuvinnuni, eru á leiðunum í Norðsjónum. Talan verður annars um at varðveita og fáa nýggj arbeiðspláss til alt økið, tilsamans 2500 arbeiðspláss.

Herfyri boðaði BP annars frá, at tað ætlar at brúkar 1 til 2 milliardir krónur til at menna oljuterminalin í Sullom Voe í Hetlandi. Ætlandi skulu innflytast meira enn 500 arbeiðarar til Sullom Voe fyri at gera hetta arbeiðið. Annars hava myndugleikarnir í Hetlandi borið ótta fyri, at virksemi í størsta oljuterminalinum í Europa fór at minka enn meira, nú so fá nýggj fund eru gjørd á eitt nú Atlantsmótinum. Tað vísir seg nú, at einki grundarlag er fyri hesum ótta longur, tvørturímóti ætla BP og onnur oljufeløg nú at útbyggja og nútímansgera oljuterminalin. Hetta er so eisini nakað, sum kann fáa týdning fyri eina komandi føroyska oljuvinnu. Í hesum sambandi verður nú eisini tosað um at leggja eina rørleiðing frá komandi framleiðsluni á Clair feltinum til Sullom Voe. Tá hann er vorðin veruleiki vilja so vera tvær rørleiðingar sum føra gass og olju frá oljufeltum nær okkara leitiøki til lands í Hetlandi. Tað skapar heilt vist perspektiv fyri eina komandi oljuleiting á føroyska landgrunninum eisini. Og tað er greitt, at nú oljuleiting skal í gongd við Føroyar og ein komandi útbjóðing stendur fyri framman í breskum øki nærhendis okkara leiðum, so vil hetta uttan iva vera við til at seta fokus á Atlantsmótið og harvið lata upp fyri stórum framtíðar íløgum í øllum hesum økinum.




## Kurvabóltskapping

Kurvabóltsfelagi Hamar fer nú aftur at stíla fyri kapping, av tíð at Hamar er tað einasta kurvabóltsliði í Føroyum verður kappingin stíla sum innandurakappingarnar í fótbólti. vit hava 5 ársbólkar teir eru: Gentur 14 ár, Kvinnur, Dreingur 14 ár, Dreingir 17 ár, Menn. og so fara vit at hava eina skotkapping fyri teir eldru leikaranar. kappingin verður spald 2 ferðir 4 minuttir í bólkinum og so verður spalt um gull og silvur, nr. 3 fær bronze. í skotkappingini verður tað Mix so at bæði kvinnur og menn spæla í senn men kvinnurnar hava handikap so at tær skjóta frá straffikast linjuni ímeðan menninir skjóta frá 3 poeng linjuni. Um hettar hevur áhuga so kunnu tit ringja á tlf: 224554 og tosa við Kenneth

## Ein gluggi út í heimin

Tíðindaskriv

Føroyar hava nú fingið sítt fyrsta portur út í heim á internetinum.

Tað er teldufyritøkan VIT sp/f sum hevur gjørt ein sonevndan portal, sum er ætlaður útlendingum, sum vilja finna upplýsingar um Føroyar á internetinum.

VIT hevur frammanundan føroyska portalin in.fo, og faroeweb.com byggir á somu tøkni sum in.fo.

Portalurin er lættur at brúka, bæði hjá teimum sum leita, og hjá teimum sum vilja verða funnin.

Umframt at vera yvirlit yvir føroyskar heimasíður, sum venda sær út um landoddarnar, hevur faroeweb.com eisini tíðindi úr Føroyum á enskum.

- Vit halda, at eitt slíkt føroyskt portur á netinum hevur manglað. Eitt samlað yvirlit yvir føroyskar heimasíður, sum venda sær út í heimin, lættir um hjá brúkarunum. Og at áhugi er fyri síðuni, og ensku tíðindunum úr Føroyum, bera vitjanirnar á síðuni eisini boð um, sigur Óli Olsen, stjóri í VIT í tíðindaskrivi.

## Børn og fiskur

Týsdagin 28-11-00 var áhugaverdur fyrilestur á Hotel Hafnia, sum Granskingardepilin fyri økismenning og Fiskivinnuskúlin í Vestmanna skipaðu fyri

Týsdagin 28. november var áhugaverdur fyrilestur á Hotel Hafnia, sum Granskingardepilin fyri økismenning og Fiskivinnuskúlin í Vestmanna skipaðu fyri, skrivar Vinnuhúsið.

Norðmaðurin Arne Tunheim greiddi áhoyrarunum frá áhugaverdu verkætlanini »Fisken, båten og havet«, sum skúlarnir, kommunurnar og fiskivinnan í Ålesundøkinum standa fyri. Verkætlanin hevur til endamáls at læra børn og ung, sum ganga í skúla hvat, sum rørir seg í fiski- og alivinnuni á sjógvi og á landi.

### Økingin tvífaldast

Norski granskingarstovnurin SINTEF hevur í eini kanning fyrr í ár, víst á, at í 2030 verða inntøkurnar frá norsku fiskivinnuni dubult so stórar sum inntøkurnar frá norsku oljuvinnuni eru í dag. Henda niðurstøða frá SINTEF hevur verið við til at styrkt tilvitanina millum norskar politikkarar, vinnu og fólk flest um týdningin av rekruttering av væl útbúgnum fólki til fiski- og alivinnuna.

Boðskapurin hjá Arna Tunheim er greiður, hann sigur at skulu virðini, sum SINTEF spáar liggja í fiski- og alivinnuni, koma til sættis í norska samfelagnum er neyðugt, at dentur verður lagdur á at vísa teimum, sum skjótt skulu velja hvørja útbúgving og lívsleið tey skulu taka, at í fiskivinnuni eru møguleikar. Norðmaðurin væntar, at búskaparligarligi vøksturin í fiski og alivinnuni fyrst og fremst fer at koma av tí at vinnan betri verður før fyri at gagnnýta tann partinum av tilfeinginum, sum ikki verður gagnnýtt í dag. Fyri at kunna gera hetta, er neyðugt við útbúgnum fólki innan búskap, biotøkni, marknaðarføring og so framvegis.

Við at vísa skúlabørnum hvat fiskivinnan hevur at bjóða og geva teimum frálæru um vinnuna so vilja størri partur av teimum ungu velja sær lívsleið innan vinnuna. Tað vil við øðrum orðum siga, at rekrutteringin av arbeiðsfólki til fiski- og alivinnuna nú byrjar longu í barnaárunum. Hetta er allarhelst neyðugt tí børnini nútíðar samfelagnum eru fjar frá tí samfelagi famiijan livur av og í. Ein onnur týdningarmikil orsøk til at vísa ungdóminum fiski- og alivinnuna er at geva komandi ættarliðum vitan um fiski- og alivinnuna eisini teimum, sum ikki kundu hugsa sær at havt sítt framtíðar yrki innan vinnuna. Hetta tíð at tey sum framtíðarborgarar og starvsfólk í einum landi sum í stóran mun livir av fiski- og alivinnuna koma at skilja vinnuna og hvørji viðurskifti gera seg galdandi í henni.

### Í fjórða flokki

Verkætlanin byrjar við børnum í fjórða flokki. Flokkurin ger avtalu við ein bát, sum tey samskifta við via satelitt einaferð um vikuna. Skiparin sigur børnum hvar hann er staddur, hvussu fiskiskapurin er, hvat fiska verður, hvønn prís tei vænta o.s.v. Børnini plotta upplýsingarnar um fiskileiðina inn í eitt kort sum hongur í skúlastovuni og hinar upplýsingarnar brúka børnini at rokna út hvat báturin fær burturúr túrinum ol.

Í sætta flokki eru børnini í 2 vikur og arbeiða úti í fiski- og alivinnuni. Í samstarvi við skúlan hava virkini funni fram til arbeiðsuppgávur, sum børnini kunnu gera á virkjunum. Í áttinda flokki skriva børnini eina frágreiðing um vinnuvirksemi á staðnum og í tígginda flokki gera tey eina interaktiva framløgu av onkrum virki á staðnum. Frágreiðingarnar og fløgan við framløguni um vinnuna verða síðani brúkt sum undirvísingartilfar til komandi flokkar.

Eftir fyrilesturin týsdagin tók Føroya Ráfiskakeyparafelag stig til at skipa fyri einum fundi har íverksetan av líknandi verkætlan her í Føroyum verður á skránni. Í næstum verður fundur millum umboð fyri Føroya Ráfiskakeyparafelag, Føroya Fiskimannafelag, Føroya Reiðarafelag, Arbeiðarafeløgini og Undirvísingar og Mentamálastýrið, skrivar Vinnuhúsið.



**Undirvísingar- og Mentamálastýrið**
**Mentamáladeildin**

## Endurlýsing Landsskjalavørður

Av tí at ov fáar umsóknir komu inn til starvið sum landsskjalavørður verður starvið sum landsskjalavørður enn einaferð lýst leyst at søkja. Tann, ið sett/ur verður, byrjar í starvinum 1. mars 2001.

**Uppgávur**
Høvuðsuppgávan hjá landsskjalavørðinum er at vera stjóri í Føroya Landsskjalasavni, sum er stovnur undir Undirvísingar- og Mentamálastýrinum og hevur til endamáls:

- at tryggja varðveitingina av savnindum (skjølum), ið hava søguligt virði og/ella hava fyrisitingarligan og rættarligan týdning fyri borgarar og myndugleikar,
- at gera tað møguligt at vraka savnindi, ið ikki eiga at verða varðveitt,
- at vera ráðgevandi hjá myndugleikum í journal- og arkivspurningum,
- at umsita arkivavtaluna millum landsstýrið og danska statin,
- at hava savnindi tøk hjá myndugleikum og almenningi,
- at veita granskarum og almenningi ráðgeving og savnstænastur
- at inna gransking í tilknýti til søvnini

**Faklig førleikakrøv**
Sett verður sum krav, at umsøkjari, fyri at verða settur í starv, hevur lokna akademiska útbúgving í søgufrøði frá lærdum háskúla á cand.phil.-, cand.mag.-, mag.art-, ella doktarastigi. Harumframt verður sett sum krav, at umsøkjarar hava leiðsluroyndir og kunnleika til savnsarbeiði og at arbeiða við skjølum. Granskingarroyndir innan søgulig vísindi eru ein fyrimunur. Tann, ið sett/ur verður í starvið sum landsskjalavørður, má góðtaka broytingar í setanar- og starvsviðurskiftum sínum í sambandi við møguligar bygnaðarbroytingar á savnsøkinum

**Persónlig førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava leiðsluførleika og -evni, góð samstarvsevni, vera ágrýtin, tænastuhugaður, miðvísur og kunna arbeiða sjálvstøðugt – og vera til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar. Umsøkjarar skulu hava góðan kunnleika til føroyskt mál.

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Magistarafelag Føroya.

**Vit kunnu bjóða**
Eitt fakliga krevjandi starv við nógvum avbjóðingum og samstarvi við aðrar stovnar og myndugleikar.

**Nærri upplýsingar um starvið**
Umsøkjarar kunnu seta seg í samband Petur Petersen, aðalstjóra, ella Jákup Thorsteinsson (tel. 355050) fyri at fáa meira at vita um starvið.

**Umsóknir**
Umsóknir við avritum av prógvum o.ø. skjølum, upplýsingum um leiðslu- og granskingarroyndir v.m. skulu vera Undirvísingar- og Mentamálastýrinum í hendi í seinasta lagi mánadagin 15. januar 2001 – og sendast til

**Undirvísingar- og Mentamálastýrið**
**Hoyvíksvegur 72**
**Postrúm 3279 – 110 Tórshavn**
**Telefon 355050 – Fax 355056**
**e-postur: UMMS@UMMS.fo**

Undirvísingar- og Mentamálastýrið hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru málsøki viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frí-tíðarvirksemi.
**Føroya Landsskjalasavn er stovnur undir Undirvísingar- og Mentamálastýrinum. Skrivstova v.m. er í V.U. Hammarshaimbsgøtu 24 í Tórshavn.**

**Almanna- og Heilsumálastýrið**
*Starvsfólkadeildin*

## Sjúkrasystir til føðideildina

Á A2 er starv sum sjúkrasystir á starvsbrøki 0,8 í blandaðum vaktum leyst at søkja til setan 1. mars 2001 ella skjótast gjørligt.

Føðideildin hevur pláss til 16 barnakonur umframt neonatala økið. Deildin er ein áhugaverd deild við nógvum avbjóðingum og góðari upplæring. Á deildini eru royndir og fakliga virknir starvsfelagar. Tann, sum verður settur í starv, hevur góðar møguleikar fyri at mennast bæði persónliga og fakliga.

**Krøv til umsøkjaran:**
- áhuga fyri sjúkrarøkt í obstretrik og neonatal
- roynist væl fakliga og miðvíst góðskumennandi
- góð samstarvsevni

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Sjúkrasystrafelag Føroya.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og møguligum viðmælum verður at senda til

**Almanna- og heilsumálastýrið**
Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2, 100 Tórshavn

Nærri fæst at vita um størvini við at seta seg í samband við deildarsjúkrasystrina Anna Jacobsen á tlf 31 35 40 lokal 167 ella Cecilia Vestureið, yvirsjúkrasystir á lokal 127.

Umsóknarfreist: 4 januar 2000, kl. 12.00

## Laboratoriið í Tórshavn
er *stongt* 22.-27.-28.-29. desember

## Laboratoriið í Runavík
er *stongt* 2. januar 2001

## Kiosk til sølu

Um hóskandi boð fæst, er kiosk í Havn til sølu. Kann yvirtakast í januar.

Áhugað kunnu skriva til:
Sosialurin,
Box 76,
110 Tórshavn,
Bill. mrk. 242




## Havnar Arbeiðskvinnufelag

Skrivstovan er stongd frá og við 23. desember. Letur upp aftur 3. januar.

**Nevndin**

## Reingerðarfólk

Til skrivstovu okkara sóknast vit eftir reingerðarfólki.

Arbeiðið er roknað at taka umleið 12 tímar um vikuna.

**P/F Poul Michelsen**

## Havnar Arbeiðskvinnufelag

Uppskot til viðgerðar á komandi aðalfundi felagsins skulu vera formanninum í hendi í seinasta lagi 15. januar.

**Nevndin**